Býráðsfundurin tann 2. oktober 2007

Týsdagin tann 2. oktober 2007 kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund við niðanfyri nevndu skrá, og har fylgjandi samtyktir vórðu gjørdar.

Allir limir á fundi uttan Atli S. Justinussen.

93.
2007-12-052 THS á læknamiðstøðini
THS (talgild heilsuskipan) er journalskipan, ið verður nýtt innan heilsuverkið. Við henni er møguligt hjá læknum at fara inn á journalir hjá sjúklinginum, eisini teir læknar, ið eru avloysarar. Soleiðis er møguleikin hjá læknanum/avloysaranum størri at avgreiða ørindini hjá sjúklinginum. Verandi journalskipan er gomul og væntast kann, at trupulleikar taka seg upp við henni. Klaksvíkar Sjúkrahús fer at taka THS í nýtslu í november 2007.
Tað er eitt eingangsgjald á kr 73.000,- pr. kommunulækna fyri nýtslurættin. Upphæddin fellur til gjaldingar, tá skipanin verður latin læknanum. Haraftrat er eitt árligt gjald á kr 14.600,- pr. kommunulækna fyri viðlíkahald og rakstur av skipanini. Neyðugt verður helst við eini byrjanarupphædd á kr 300.000,-. Umsitingin hevur onga konto at vísa á, og verður tí neyðugt við eykajáttan. (Sí skriv frá SoD, dagfest 06.09.07).

Sosiala Nevnd tekur udir við, at THS skipanin skal setast í verk á Læknamiðstøðini. Tá Sosiala Nevnd onga konto hevur at vísa á, heitir hon á Fíggjarnevndina um at útvega peningin. (SoN, 12.09.07)

Vísandi til SoN 12.09.07, mælir Fíggjarnevndin til, at málið verður framt, um tað kann fíggjast innan fyri verandi fíggjarætlan við flyting millum kontur, sum verður at leggja fyri komandi býráðsfund. (FíN, 19.09.07)

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við SoN og FíN og tilmæli um flyting millum kontur, dagfest 1. oktober 2007, frá Sosialu Deild.

94.
2007-17-041 Mylnuhúsið - Umsókn um eykajáttan
Mylnuhúsið søkir um eykajáttan kr. 75.000,- til neyðugar umvælingar (trygdarkrøv) í Mylnuhúsinum og til bráðfeingis umvælingar í Sornhúsinum. Sosiala Deild sær ongar møguleika at útvega peningin innanfyri verandi fíggjarkarmar. Víst verður á, at upphæddin kann takast av Grunnum 2006. (Sí skriv frá SoD dagfest 06.09.07)

Sosiala Nevnd samtykti at taka undir við skrivi frá SoD frá 06.09.07.

Fíggjarnevndin tekur undir við SoN 12. september 07.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

95.
2007-10-021 Asfaltering á Norðborg
Eitt tilboð er innkomið viðv. asfaltering og planering av økinum uttanfyri Norðborg. HJ Asfalt bjóðar seg til at gera arbeiðið fyri kr.795.569,40 u/mvg. Sí skriv frá TU, dagfest 6. september 2007.

Havnanevdin útsetir málið til komandi ár

Í notati, dagfest 19. september 2007, mælir Tekniska Umsiting til at fremja arbeiðið, og at hetta verður fíggjað við flyting millum kontur. Sí skriv.

Fíggjarnevndin tekur undir við notati frá T.U. dagf.19.september 2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá FíN samtykt.

96.
2007-11-069 Ymisk nøvn – uppskot – Gøtunavnanevndin
Gøtunavnanevdin setir fram hesi uppskot til nøvn, og mælir til at:
- av tí, at talan ikki er um nakran hólm, at higartil nýtta navnið "Grønhólmur" fellur burtur og plássið ístaðin verður kallað "**Grønheyggur**"
- at nýggja havnin í Ánunum fær navnið „**Norðhavnin**"
- at uppfylta økið, har alingin er á Strond verður kallað "**Við Strandasand**"
- vegurin úr Eysturoyarvegi niðan til bátahylin fær navnið **"Oman Váðklett"**
- eystari partur av Nýggjavegi – frá rundkoyringini til Heygaveg fær navnið " **Har Yviri** "
- at Skákvegurin frá Helnabrekku og niðaneftir fær navnið "**Helnaskákið**

Tekniska Nevnd tekur undir við skrivi frá Teknisku Umsiting dagf. 7. sept. 2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt burtursæð frá navninum "Grønheyggur", sum GøtunN ynskir at viðgera av nýggjum.

97.
2006-11-007 Uppskot til gøtunøvn í Mikladali og á Trøllanesi
Gøtunavnanevndin hevur – saman við staðbundnu nevndunum í Mikladali og á Trøllanesi – arbeitt við uppskoti til veganøvn í bygdunum báðum, og sum úrslit av hesum arbeiði setir nevndin fram uppskot til veganøvn. (víst verður til skriv frá Teknisku Umsiting dagf. 3. sept. 2007 við tilhoyrandi korti)

Tekniska Nevnd tekur undir við skrivi frá Teknisku Umsiting dagf.3.sept.2007

Mikladalsnevndin tekur undir við uppskotinum til gøtunøvn í Mikladali. Tó mælir nevndin til, at vegastrekkið frá fótbóltsvøllinum og suðureftir fær navnið: "**Gerðisvegur"**

Trøllanesnevndin tekur undir við uppskotinum til gøtunøvn á Trøllanesi

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá GøtunN, TN, MikladN og TrøllanesN samtykt.

98.
2006-11-007 Uppskot til gøtunøvn á Norðoyri
Gøtunavnanevndin setir fram uppskot til veganøvn á Norðoyri (sí skriv frá Teknisku Umsiting dagf.7.september 2007 við tilhoyrandi korti)

Tekniska Nevnd tekur undir við skrivi frá Teknisku Umsiting dagf.7.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

99.
2007-19-095 Val av limi í valnevndina
Veljast skal ein limur í valnevndina fyri Trónd Fuglø, ið ynskir at verða loystur úr valnevndini fyri býráðsval í Klaksvíkar Kommunu í skrivi frá 12. juli 2007.

Býráðsins samtykt:
Málið útsett til fyrst komandi býráðsfund.

100.
2007-14-008 Grótvirkið á Strond - meirøki á Strond og fjørulendi í Ánunum
Umsitingin hevur biðið Stranda Haga um loyvi at keypa lendi til "víðkan av Grótbrotinum á Strond" og "fjørulendi í Ánunum". Bjóðaði prísurin fyri lendið á Stond er tann sami, sum kommunan keypti fyri frá haganum í 2005, nevniliga kr. 79,-/m^2. Bjóðaði prísurin fyri fjørulendið er kr. 50,-, sum er tann sami, sum avtala er gjørd í 2007 við Uppslahaga um fjørulendið við Borðoyarvík. - Viðv. grótbrotinum á Strond sigur Stranda Hagi seg vilja selja umbidna øki fyri kr. 88,-/m^2, sum er prísurin hjá Búnaðarstovuni fyri øki A2 (Ánirnar liggja í A2, men Strond liggur í A4 við prísinum kr. 55,-/m^2).- Viðv. fjørulendinum í Ánunum sigur Stranda Hagi seg vilja selja fyri prísin hjá Búnaðarstovuni, sum er kr. 71,-/m^2.- Viðv. kravda prísinum uppá kr. 88,-/m^2 , mótvegis bjóðaða kr.79,-m^2 fyri økið á Strond, verður hetta lagt upp til nevndina til støðutakan við tí í huga, at "Búnaðarstovuprísurin" fyri økið við Borðoyarvík nú er settur at vera kr. 88,-/m^2 (Talan er um uml. 6.200 m^2)
Við úttangsstøði í prísunum hjá Búnaðarstovuni fyri lendi í Ánunum, mælir Tekniska Umsiting til, at fjørulendið verður keypt fyri kr. 71,-/m^2 (Talan er um uml. 1050m^2)

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf.10.09.2007

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 11.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

101.
2007-15-040 Øki til eldsløkkiplatt - Trygdarmiðstøðin
Í samband við komandi koyriveg til ídnaðarøkið við Borðoyarvík verður neyðugt at flyta verandi eldsløkkingar-pall hjá Trygdarmiðstøðini á annað stað. Í skrivi móttikið 31.august 2007 vísir Trygdarmiðstøðin á økið beint

norðanfyri verandi bygning á økinum sunnanfyri bátahylin við Borðoyarvík – til víddar uml. 400 m^2. Partur av umsøkta økinum er ogn hjá Uppsalahaga.- Fæst ein avtala við Uppslahaga um keyp av øki, metir Tekniska Umsiting onki vera til hindurs fyri, at Trygdarmiðstøðin kann fáa til leigu umrødda øki, treytað av, at bygging og virksemi á økinum verður í trá við galdandi ásetingarnar fyri økið. –

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá TU. dagf. 5.sept.2007, og at leigusáttmálin verður endurskoðaður

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá TN dagf.05.09.07

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevdini 11.sept.2007 og Teknisku Nevnd 11.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

102.
2007-15-039 Økið til Trygdarmiðstøð við Borðoyarvík
Trygdarmiðstøðin vísir á økið, sum teir hava tørv á til bygging av Trygdarmiðstøð.
Talan er um uml. 4000m^2 á uppfylta økinum uttanfyri bátahylin við Borðoyarvík. Teir boða samstundis frá, at teir ynskja økið til leigu og ikki til keyps.
Málið verður lagt fyri nevndirnar við tilmæli um at: økið til Trygdamiðstøðina verður matrikulerað sambært umsókn, treytað av at teir ikki fara niðan um fluktina av vestara kanti av bátahylinum
til støðutakan: um Trygdarmiðstøðin kann sleppa at leiga økið, hóast hini stykkini á ídnaðarøkinum verða seld

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum um matrikulering av økinum til trygdarmiðstøðina, og at stykkið verður latið sum leigugrund. Eisini varð viðtikið, at trygdarmiðstøðin sjálv ber útreiðslurnar inni á stykkinum og somuleiðis til íbindingar til vegin omanfyri

Havnanevndin tekur undir við málinum og mælir til at selja fyri kr.600,-/m^2 vísandi til høga annlegskostnaðin

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini frá 11.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá HaN og FíN samtykt.

103.
Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 867
Víst verður til umsókn frá Hans Christian Øregaard um sundurbýti av matr.nr. 867, sum áður er samanlagt til eina samlaða ætlan á økinum. – Av tí at vent verður aftur til upprunaliga grundøki, hevur umsitingin onki at viðmerkja.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf.6.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

104.
Umsókn um makaskifti - matr.nr. 127
Eigarin av matr.nr.127,sum eigur lendi undir parti av Kelduskákinum, spyr um kommunan ikki kann makaskifta við hann, soleiðis at hann fær somu vídd norðanfyri ogn sína við Stoksoyrarveg, sum hann letur til kommunala vegin, Kelduskákið.
Umsitingin tekur undir við hugskotinum, men av tí at lendið, makaskiftast skal við, er ogn hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum verður mælt til, at roynd verður gjørd at ogna sær hetta.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum frá Tekn.Ums. 6.sept.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

105.
2007-15-032 Umsókn um sundurbýti matr.nr. 1133a
Víst verður til skriv frá Hans Josephsen dagf. 19.juli 2007.- Lógin um eigaraíbúðir stavar frá 3.apríl 1970 meðan bygningurin er frá 1985, so hesi viðurskifti skuldu verið í lagi. Í samband við sundurbýti , kann trupuleikin tó verða, at tað ikki framgongur av byggiloyvinum ella umsóknini um byggiloyvi, at ætlanin er at býta bygningin sundur í eigaraíbúðir. Hinvegin framgongur týðiliga av bæði byggiloyvi, tilfarsvali og innrætting, at bygningurin er ætlaður at kunna nýtast til ymisk sjálvstøðug endamál. Ùtfrá omanfyristandandi kann Tekniska Umsiting mæla til, at málið verður sent matrikulstovuni við tilmæli um sundurbýti sambært umsókn .

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf.22.aug.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

106.
2007-15-029 Sundurbýti av matr.nr.1002
Kirstin Joensen søkir um loyvi at býta ogn sína við Stangaveg 144 sundur í tveir partar. Tekniska Umsiting mælir til at málið verður sent matrikulstovuni við tilmæli um at fremja sundurbýti soleiðis, at bæði stykkini lúka ásetingarnar í byggisamtyktini.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf.23.aug.2007

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

107.
2007-17-036 Fíggjarætlan 2008 – býráðið
Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan, dagfest 26. september 2007, sum javnvigar við einum halli á 20,909 mill. kr. Til býráðsfundin verður gjørt uppskot um skerjingar í rakstrinum á 2 mill. kr.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. september 2007 samtykt at mæla til óbroytt kommunuskattaprosent og barnafrádrátt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá FíN samtykt, vísandi til skriv frá borgarstjóranum, dagfest 2/10-07.

108.
2007-19-052 Bygnaðar- og viðtøkubroytingar – SEV
Víst verður til fyriliggjandi uppskot um nýggjan bygnað fyri SEV, sum býráðslimir á eykafundi tann 26. september 2007 hava tikið undir við.

Málið verður við hesum lagt fyri býráðið til formliga staðfesting.

Býráðsins samtykt:
Samtykt

Fundur lokin.